# Løgtingið má taka eina støðu í Irakmálinum

**Javnaðarflokkurin hevur boðað frá, at hann fer at leggja uppskot fyri løgtingið, sum skal fáa tingið at boða frá, hvør almenna føroyska støðan til Irakkreppuna er**

HEIMSPOLITIKKUR
*Edvard Joensen*



*Jóannes Eidesgaard og Tony Blair eru ikki samdir um, hvusus kreppan í Irak skal loysast. Jóannes Eidesgaard sigur, at heldur ikki innanfloks í enska Labour flokkinum eru øll, sum er samd við forsætisráðharanaum, og í enska fólkinum er meiriluti í móti tí*

Nú eiga føroyingar at koma við eini klárari fráboðan um, hvørja almenna støðu vit hava til kreppuna, sum heldur øllum heiminum í skáki, sigur Jóannes Eidesgaard, formaður í Javnaðarflokkinum.

Føroya Javnaðarflokkur hevur boðað frá, at hann fer at leggja uppskot fyri løgtingið, sum skal noyða tingið til at koma við eini greiðari útmelding um tingsins støðu. Eisini hevur uppskotið til endamáls at fáa løgmann at koma við eini útmelding um støðuna hjá landsstýrinum.

– Vit kunnu ikki bara sita her í hesum rómapottinum og halda, at vit kunnu lata sum einki, sigur hann. Gera vit tað, eru vit heimsins størstu egoistar. Tí vilja vit á hendan hátt heita á løgmann um at boða frá úti í heimi, hvør almenna føroyska støðan í málinum er, sigur Jóannes Eidesgaard.

### Bíða efir løgmanni

Hann sigur, at øll hava gingið og bíðað eftir løgmanni, men haðani kemur einki. Ikki tí, at vit ikki fyrr hava blandað okkum upp í kjakið um eitt nú hernaðarmál. Vit kenna øll til tær hernaðarsamtyktirnar, sum fyrr eru gjørdar av Føroya Løgtingi, vísir hann á.

Í stuttum gongur fráboðaða uppskotið hjá Javnaðarflokkinum út uppá, at einki skal gerast í Irak uttan í ST høpi, sigur Jóannes Eidesgard. Hann vísir á, at bestu úrslitini í slíkum støðum havi vit sæð, júst tá ST hevur staðið fyri tí, sum gjørt er. Til dømis í Kosovo, Afghanistan og eisini í seinasta Flógvakrígnum, sum var. Tað gekk rímiliga skjótt fyri seg.

Hinvegin er seinasta kríggið, amerikanarar hava ført av sínum eintingum, Vietnamkríggið. Og tað var bæði drúgt og blóðugt., vísir hann á.

– Vit hava eisini eina skyldu mótvegis teimum føroyingum, sum hava sítt arbeiði í økinum, talan er um. Tað eru als ikki so fáir føroyingar, sum eitt nú sigla á leiðini, sigur formaður Javnaðarfloksins.

### Ymiskar støður

Jóannes Eidesgaard sigur, at hann vónar at fáa aðrar flokkar á tingi at taka undir við uppskotinum hjá Javnaðarflokkinum. Bæði úr samgongu og andstøðu. Og skilligt er, at hann setir sítt álit á Tjóðveldisflokkin, sum hann metir hava somu støðu til málið, sum Javnaðarflokkurin hevur. Tað byggir hann millum annað á felagstiltakið, flokkarnir skipaðu fyri við friðargonguni fyri stuttum.

Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins, sigur, at hansara persónliga støða til málið er greið og eisini almannakunngjørd. Hann hellir til ST loysnina.

– Tað undrar meg, sigur Høgni Hoydal, at eingin hevur víst á, at um nú herdeildir endiliga skulu sendast inn í Irak at fáa stýrið har av vegnum, so eiga tað at vera ST herdeildir. Vit kunnu ikki liva við eini skipan, har tey sterku londini bara kunnu gera við veikaru londini, sum teimum lystir.

Tjóðveldisflokkurin hevur greiða støðu í verjumálum, sigur Høgni Hoydal. Men hetta ávísa uppskotið frá Javnaðarflokkinum er ikki komið fyri tingið í skrivandi stund, so Tjóðveldisflokkurin hevur ikki sæð tað enn.

– Men vit fara at viðgera tað, og allar meiningar skulu hoyrast, áðrenn ein almenn støða verður tikin og kunngjørd, sigur Høgni Hoydal.

Hann heldur, at føroyingar nú eiga at koma burtur frá tí barnsliga skotgravar politikkinum, vit hava sæð bæði í áttatiarunum og ikki heilt frítt nú eisini, síðan hetta málið tók seg upp.

Jørgen Niclasen, tingmaður Fólkafloksins, sigur, at Fólkaflokkurin heldur ikki kennir uppskotið, men fer at viðgera tað, tá tað kemur.

Hinvegin hevur Fólkaflokkurin eina greiða støðu til Irakmálið, sigur hann. Hon er almannakunngjørd við tí brævinum, Fólkaflokkurin herfyri sendi danska forsætisráðharranum, har sagt verður, at Fólkaflokkurin tekur undir við hansara stuðuli til USA í hesum máli.

# Sildberin skal halda skil á

**Com Data hevur gjørt eina viðlíkahaldsskipan, ið serliga er ætlað skipum**

TELDUSKIPAN
*Eirikur Lindenskov*

Com Data hevur framleitt eina viðlíkahaldsskipan, serliga ætlað skipum og verkstøðum.

– Talan er um ein føroyska loysn, har hugt hevur verið eftir øllum sum er á marknaðinum, og síðani er tað besta tikið burturúr til føroysku skipanina, sigur Ísak Jacobsen, deildarstjóri hjá Com Data.

Fríggjadagin í síðstu viku var samkoma á Maskinmeistaraskúlanum, tí Com Data hevur latið skúlanum forritið til nýtslu í undirvísingini.

Com Data ger nógvar skipanir til virki av ymsum slag. Men Sildberin, sum hendan skipanin eitur, er serliga ætlað skipum.

– Tá virksemið verður størri enn sum so, at tú kanst hava tað í høvdinum, tá vil eg siga, at brúk er fyri skipanini, sigur Ísak Jacobsen, tá vit spyrja hann, hvussu stórt virksemi skal til, áðrenn tú hevur brúk fyri slíkari skipan.

– Um tú t. d. skalt á ein langan ísfiskatúr, so kanst tú við hesi skipanini vita júst hvat tú skalt hava við og hvat tú skalt keypa til túrin, sigur Ísak Jacobsen.

Tað eru Hjørleif Bech og William West á Com Data, sum hava ment skipanina í neyvum samstarvi við maskinmonnum, sum hava roynt skipanina og gjørt viðmerkingar.

– Tað er einki dulsmál, at vit eru erpnir av skipanini, tí hóast aðrar skipanir eru, so er hetta tann fyrsta, sum er framleidd beinleiðis til endamálið, sigur Ísak Jacobsen.

Skipanin er fyrst og fremst gjørd til føroyska marknaðin, men tað er eingin trupulleiki at umseta hana til onnur mál eisini, sigur Ísak Jacobsen.



*Ísak Jacobsen, deildarstjóri á Com Data, handar Gordon Hofgaard, stjóra á Maskinmeistaraskúlanum, loyvisbrævið til skipanina*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



# Vilja hava Bjarna Djurholm at hugsa seg um einaferð enn

**–Tað er fólksins vilji at tunnilin ímillum Øravík og Hov verður gjørdur eftir tí nýggja uppskotinum, sigur starvsfólkið á Suðuroyar Sjúkrahúsi**

HOVSTUNNIL
*Áki Bertholdsen*



*Myndin vísir tey bæði uppskotini sum er gjørd um tunnil ímillum Øravík og Hov. Rundingurin høgrumegin er tunnilin, sum Landsverkfrøðingurin ætlar at gera og sum Starvsfólkið á Suðuroyar Sjúkrahúsi heitir á landsstýrið um at sleppa. Rundingurin vinstrumegin er tunnilin, NCC kann bora og sum er nógv betri fyri ferðsluna*

–Ætlanin at gera tunnil ímillum Øravík og Hov eftir uppskotinum hjá Landsverkfrøðinginum eigur at verða slept ongantíð ov skjótt.

Eisini starvsfólkið á Suðuroyar Sjúkrahúsi hava nú lagt seg út i kjakið um, hvussu ætlaði tunnilin ímillum Øravík og Hov skal leggjast.

Og teiy heita staðiliga á Bjarna Djurholm, landsstýrismann í vinnumálum um at hugsa seg um einaferð afturat og at leggja tunnlin, har NCC hevur bjóðað sær til at bora og at sleppa ætlanini at bora, har Landsverkfrøðingurin ætlar.

Í tveimum brøvum til Bjarna Djurholm, sum tilsamans 90 starvsfólk á Suðuroyar Sjúkrahúsi hava skrivað undir, fegnast tey um ætlanina at bøta um sambandið ímillum syðru og norðaru helvt í Suðuroy. Í einum brævi, sum 22 starvsfólk á Sjúkrahúsinum, sum búgva í syðru helvt í oynni, hava skrivað undir, siga tey, at tað hevur hevur verið teirra største ynski í mong ár at fáa betri samband, tí tey hava verið sera ótrygg at koyra eftir tí vánaliga vegnum, serliga um veturin og í óðnarveðri. Tey vísa eisini á, hvussu nógv ferðslan er økt seinastu árini og serliga stúra tey fyri teimum stóru bilunum, sum volda stórar trupulleikar á tí smala vegnum. Men tey siga eisini, at tað harmar tey at tunnilin skal liggja uppi á hálvari Hovsegg, soleiðis sum Landsverkfrøðingurin hevur ætlað og tað skilja tey ikki. Tí vóna tey, at hendan ætlanin verður slept ongantíð ov skjótt, og at tunnilin kemur at liggja lægri og longur vesturi, har NCC hevur bjóðað sær til at bora, so sleppast kann undan at fara uppí hæddina.

Verður ætlanin hjá NCC fylgd, slepst undan nógvari nýgerð av vegi og harvið eisini undan nógvari kavarudding og nógvum haldi og tað fer at spara nógvar milliónir, bæði í orku peningi og tíð.

– Av tí at vegaføringin við hesi nýggju ætlanini verður nógv styttri, kann grótið úr tunlinum ístaðin verða nýtt til útfylling av tí nýggju samferðsluhavnini, ið skal gerast á Tvøroyri, sigur starvsfólkið á Suðuroyar Sjúkrahúsi.

Tey vísa á, at undirsjóvartunnilin ímillum Lorvík og Klaksvík skal ganga undir Lorvíksbygd at at tað fer at dýrka tunnilin 27 milliónir .

– Tað verður sagt, at hetta verður gjørt tí at tað er fólksins vilji har á staðnum. Tí meta vit, at suðuroyingar hava sama rætt at seta somu krøv. Í Suðuroy er tað fólksins vilji, at tunnilin verður lagdur sum NCC hevur bjóðað sær til at bora og tað eigur at verða tikið til eftirtektar.

Tey vísa eisini á, at tey serkønu í tunnilgerð siga, at tað er eingin trupulleiki at gerðast tunnilin, sum NCC hevur bjóðað sær at bora við teimum nýúímas amboðum, sum í dag verða nýtt.

– Og verður tunnilin fyrst lagdur á skeivum stað, vendst ikki aftur, leggja tey afturat.

### Sita mangan við ótta

Samstundis hava 68 onnur starvsfólk á Suðuroyar Sjúkrahúsi, sum búgva í norðaru helvt í Suðuroy, eisini sent landsstýrismanninum bræv, har tey stuðla ynskinum frá starvsfeløgunum í syðru helvt.

Tey siga, at tey hava mangan sita við ótta í ringum veðri ímeðan starvsfelagir sunnan av oyggj hava verið á veg til ella frá arbeiði.

Tey hava eisini mangan verið noydd at átikið sær eyka vaktir, eins og tey, sum búgva sunnanfyri, mangan hava verið noydd at gista á sjúkrahúsinum tí at tað er ikki koyrandi ímillum.

Samstundis hava fleiri av teimum børn, sum dagligas koyra um Hovsegg og tí stuðla tey ynskinum um at tunnilin verður lagdur, har NCC kann bora hann.

Tey siga, at tey skilja ikki, at Landsverkfrøðingurin ætlar at gera ein tunnil, sum harafturat verður dýrari enn neyðugt og tí heita tey á landsstýrismannin um at sleppa ætlanini hjá Landsverkfrøðinginum og heldur at gera tunnilin, sum NCC kann bora.

# Gott ár hjá Føroya Sparikassa

**Føroya Sparikassi 75,9 mió. kr. í yvirskoti áðrenn skatt. Nevndin fer at skjóta upp fyri aðalfundinum, at 34 mió. kr. verða lutaðar út sum vinningsbýti til partaeigararnar, svarandi til eitt vinningsbýti upp á 5%**

BÚSKAPUR
*Tíðindaskriv frá Føroya Sparikassa*



*Bjarni Olsen, stjóri og Marner Jacobsen, forstjóri í Sparikassanum. Partabrøvini í Sparikassanum høvdu við árslok eitt innara virði upp á 129 kr pr. 100 kr í partapeningi*

Føroya Sparikassi hevði eitt gott úrslit í 2002. Avlopið áðrenn skatt gjørdist 75,9 mió. kr., og ársúrslitið eftir skatt 60,6 mió. kr. Hetta er besta roknskaparúrslit hjá Sparikassanum nakrantíð. Roknskapurin verður lagdur fyri aðalfundin til góðkenningar tann 21. mars 2003.

Úrslitið av fíggjarpostum øktist við 27,7 mió. kr. svarandi til 13,7%, úr 202,9 mió. kr. í 2001 upp í 230,6 mió. kr. í 2002. Nettorentuinntøkurnar øktust við 13,9 mió. kr. í 2002 ella 7,5%. Inntøkurnar av ómaksgjøldum hækkaðu við 4,5 mió. kr. svarandi til 36,6%. Hartil hevði Sparikassin ein kursvinning uppá virðisbrøv og gjaldoyra uppá 6,4 mió. kr. móti einum kurstapi uppá 2,3 mió. kr. í 2001.

Hinvegin eru rakstrarútreiðslurnar øktar við 11,9 mió. kr. ella 11,2%, úr 106,3 mió. kr. í 118,2 mió. kr. Lønarútreiðslurnar øktust við 3,2 mió. kr. ella 5,4%, meðan restin av økingini í rakstrarútreiðslunum fyri stóran part stavar frá eyka kostnaði í sambandi við umleggingina til partafelag, ábyrgdarafundum og menning av Balanced Scorecard sum leiðslutóli.

Avskrivingarnar av ítøkiligum ognum gjørdust 15,8 mió. kr. móti 8,7 mió. kr. í 2001. Hetta er ein øking uppá 7,1 mió. kr., harav 6,5 mió. kr. stava frá niðurskriving av ognum Sparikassans. Avskrivingar og burturleggingar av skuldarum, netto, gjørdust 18,0 mió. kr. móti 13,0 mió. kr. í 2001. Hetta er ein øking uppá 5,0 mió. kr.

Úrslitið áðrenn skatt gjørdist sostatt 75,9 mió. kr. móti 73,8 mió. kr. í 2001. Føroya Sparikassi hevur útreiðsluført 15,3 mió. kr. í skatti í 2002 móti 16,3 mió. kr. í 2001. Ársúrslitið eftir skatt er tað besta nakrantíð hjá Sparikassanum, nevniliga 60,6 mió. kr. móti 57,5 mió. kr. í 2001.

Fíggjarstøðan javnvigaði við 5,191 mia. kr. við ársenda 2002 móti 4,954 mia. kr. í 2001. Vøksturin er 237 mió. kr. ella 4,8%.

Útlánini við ársenda 2002 vóru 3,979 mia. kr. móti 3,589 mia. kr. í 2001. Vøksturin er 390 mió. kr. ella 10,9%, og hevur vøkstur verið bæði til vinnu og privat, meðan útlánið til almennar myndugleikar o.t. er fallið. Innlánini vóru 3,947 mia. kr. í 2002 móti 3,792 mia. kr. í 2001. Vøksturin er 155 mió. kr. ella 4,1 %. Útlánsprosentið, tað er lutfallið millum útlán íroknað burturleggingar og innlán, var 102,9% móti 96,4% í 2001.

Eginognin er nú 877 mió. kr. móti 820 mió. kr. við árslok 2001. Hetta er ein vøkstur uppá 57 mió. kr.

Solvensprosentið við árslok var 22,0% móti 24,1% við árslok 2001. Lógarkravið er 8%. Gjaldførið var 798 mió. kr. við árslok 2002 móti 934 mió. kr. í 2001. Sparikassin hevur sostatt ein yvirdekning í mun til lógarkrav um gjaldføri uppá 80,6%.

Eginpeningurin varð rentaður við 7,1% eftir skatt í 2002 móti 7,3% í 2001. Fallið stendst av, at eginpeningurin er øktur lutfalsliga meira enn úrslitið er økt, m.a. vegna tann stóra áhugan at tekna partapening í Sparikassanum.

– Nevndin fer at skjóta upp fyri aðalfundinum, at 34 mió. kr. verða lutaðar út sum vinningsbýti til partaeigararnar, svarandi til eitt vinningsbýti upp á 5%. Partabrøvini høvdu við árslok eitt innara virði upp á 129 kr. pr. 100 kr. í partapeningi, siga Marner Jacobsen, forstjóri og Bjarni Olsen, stjóri í Føroya Sparikassa í tíðindaskrivi.